# Gyltir tvíburðar

**Tvíburðarnir Ragna og Rannvá Andreasen úr Klaksvík hava altíð havt stóran áhuga fyri bóltspæli. Serliga hava tær gjørt seg galdandi innan fótbóltin, har tær upp gjøgnum árini hava vunnið mangt gullmerki. Nú eru tær júst farnar í gongd við fótbóltsvenjingina aftur**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*




*Eitt ótal av heiðursmerkjum er tað blivið til. Og Rannvá, sum situr høgrumegin, hevur verið toppskjútti tríggjar ferðir og harvið ognað sær tríggjar gyltar skógvar*

**Klaksvík:** Tær eru sum tveir dropar at síggja til, og tað kann vera sera torført hjá einum, sum ikki kennir tær at vita hvør er hvør, hóast onnur hevur stutt hár. Men tá ein hevur tosað við tær eina løtu, so byrjar ein at síggja mun.

Tvíburðarnir Ragna og Rannvá Andreasen hava spælt fótbólt við KÍ og hondbólt við Stjørnuni í mong ár.

– Okkum hevur altíð dámað væl fótbólt, og vit byrjaðu sum níggju ára gamlar við pinkunum, greiðir Ragna frá.

Tvíburðarnir báðar hava altíð hildið saman. Og sært tú aðra, so kanst tú vera vísur í, at hin ikki er langt burtur. Men í oktobur í fjør fór Ragna til London at vitja drongin hjá sær. Hon var har í tríggjar mánaðar.

– Ja, hetta er fyrstu ferð, at eg havi havt frí so longi frá ítrótti, sigur Ragna.

Drongur hennara býr í London, og hon var og vitjaði hann í tríggjar mánaðar og arbeiddi á eini Mc Donald´s matstovu.

– Har var ordiliga deiligt at vera, men eg mátti heimaftur, tí fótbólturin byrjar nú, sigur Ragna við einum skeivum smíli.

– Ein má raðfesta rætt, leggur hon afturat og stórflennir.

– Tað var ringt hjá mær at vera hana fyri uttan so longi, tá ein ikki hevur roynt tað áður, og eg var eitt sindur bangin fyri, at hon ikki fór at koma heimaftur, men eg uggaði meg við, at hennara visum var bara fyri tríggjar mánaðar, sigur Rannvá og smílist. Ragna hevur hug at flenna og sigur, at tað var løgið at vera so longi burtur.

– Tað longsta, vit hava verið frá hvørjari aðrari er ein vika, so tríggir mánaðir tyktust sera longi, sigur Ragna, sum er fegin um at vera heima aftur.



*Rannvá og Ragna sigurssælar eftir at hava vunnið gull á Oyggjaleikunum í 2001 á Isle of Man*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fótbóltur og hondbóltur

Báðar tvær gleða seg til kappingin byrjar aftur.

Tær eru júst byrjaðar aftur at venja við fyrstu deildar liðinum hjá KÍ, og hondbólturin koyrir framvegis, so tær eru upptiknar við bóltspælið so at siga hvønn dag.

– Tað kann vera strævið til tíðir, serliga meðan bæði koyra, men hugurin er so góður, at vit høvdu helst ikki dugað at hildið frí, sigur Rannvá, sum í fótbólti er í áleypari, meðan hon stendur í málinum í hondbóltinum.

Hon sigur, at hon tímir ikki so væl at vera í mál, hóast hon altíð hevur verið har.

– Eg má venja, tí eg dugi ikki at halda frí, sigur hon.

Ragnu dámar væl hondbólt eisini, men ongin ivi tykist at vera um, at um tær skuldu valt, so høvdu tær valt fótbóltin.

Sum sagt byrjaðu tær at spæla fótbólt sum níggju ára gamlar, og hava tær fylgt við allan vegin uppeftir, til tær komu á fyrstu deild í 1997. Og tað hevur verið ein sannur gullrúsur hjá teimum og øllum hinum á liðinum síðani. Ikki færri enn fimm meistaraheitir er tað blivið til, og steypakappingina hava tær verið við til at vunnið tríggjar ferðir. Og einaferð í heyst fara tær við liðinum til triðju Evropa Cup luttøkuna á rað. Umframt hetta, so hava tær báðar eisini verið á Oyggjaleikunum, har tað gekst føroyska liðinum avbera væl.

– Okkara árgangur var so stórur, sum byrjaði í pinkunum, og so hava so gott sum allar spælt allan vegin upp, so vit eru sera væl samanspældar og moralurin og samanhaldið er av tí besta, siga tær báðar, tá spurt verður um, hvussu tað ber til, at tað hevur gingist KÍ kvinnunum so væl í fleiri ár nú.

Og tað er ongin ivi um, at viljin til at vinna er tilstaðar, tí eitt tap koyrir tær ikki niður við nakkanum.

– Nei! Tá verða vit bara enn meira uppsettar, siga tær við ein munn. Men teimum dámar ikki so væl at tosa um taptar dystir. Til dømis vóru tær við, tá liðið tapti steypafinaluna móti HB í 2001.

– Tað var ræðuligt, men vit settu í okkum, at árið eftir skuldi tað verða, og tá vunnu vit eisini ein sannførandi 6-1 sigur á HB á Tórsvølli og so eisini føroyameistaraskapin, siga tær við einum smíli.

Tvíburðarnir báðar verða sum sagt aftur at síggja á vøllinum, tá kappingin hjá kvinnunum fer av bakkastokki um einar tveir mánaðar. Spurdar um framtíðina, siga báðar, at tær hava ætlanir um at lesa, men hvat og hvar tað skal verða, vita tær ikki enn.

– So fyri fyrst verður tað ein karriera á Roykivirkinum og fótbóltur, sigur Rannvá skemtandi, og báðar leggja so afturat, at um tær fara aðrastaðni at lesa, so vilja tær altíð koma heimaftur at búgva.

– Heimið er tað besta stað á jørð, eru gyltu tvíburðarnir á einum máli um.

**Húsavørður**

**Hervið verður søkt eftir húsaverði til Sølumiðstøðina SMS.**

Dugnaligur maskinmeistari er í starvi. Hann hevur ábyrgdina av elverkinum, maskinum og tólum.
Títt starv verður at syrgja fyri, at SMS-bygningurin annars altíð er í góðum og bærligum standi - innan sum uttan.

Vit rokna við at tú hevur gott handalag og kanst fremja flest allar umvælingar og ábøtur, sum ein virkin gerandisdagur krevur. Ein hóskandi handverkaraútbúgving er ein fyrimunur.

Starvið er fulltíðarstarv at setast sum skjótast, men vit bíða eftir tí rætta persóninum.
Løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

Ert tú ein nærlagdur persónur, sum dugur at arbeiða sjálvstøðugt, ert tú vælkomin at søkja starvið sum húsavørður í SMS.
Skrivlig umsókn, sum verður viðgjørd í trúnaði, skal sendast til:

SMS
Postboks 1059
110 Tórshavn
att.: Hans Mortensen

**Krambafólk**

**Søkt verður eftir krambafólki til Benetton í SMS.**

Starvið er eitt fulltíðarstarv, sum skal setast skjótast gjørligt.

Tað er ein fyrimunur, um tú dugur væl við fólki og ert hýrdigur og fyrikomandi.

Løn og arbeiðstreytir sambært avtalu.

UNITED COLORS OF BENETTON.

Skrivlig umsókn skal sendast til:

SMS
Postboks 1059
110 Tórshavn
att.: Noomi Wehe



**Avloysari til Goymsluna á Føroya Tele**

"Viðskiftafólk eru ikki viðskiftafólk. Viðskiftafólk eru menniskju"

Fyri starvsfólk í farloyvi verður søkt eftir avloysara í eitt ár til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. mars 2003 ella skjótast møguligt.

**Uppgávurnar eru:**
Vøruútflýggjan, skráseting og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal hava goymsluútbúgving, ella hava royndir innan goymslu ella líknandi. Dentur verður lagdur á, at tann sum sett/-ur verður, kann veita eina góða tænastu, kann arbeiða sjálvstøðugt og arbeiða væl saman við øðrum.
Koyrikort er kravt.

**Fyrimunur er at:**
· hava EDV-kunnleika á brúkarastøði
· vera røkin
· duga enskt

**Føroya Tele kann bjóða eitt starv**
· í einum mennandi umhvørvi
· við fakligari og persónligari menning
· í góðum arbeiðsumhvørvi

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Eliasson Egholm, ella til Starvsfólkadeildina. Tlf. 303030.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. februar 2003.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
110 Tórshavn



FØROYA TELE

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 25.01. kl. $20^{15}$
Leygardagin 25.01. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 26.01. kl. $19^{45}$
Sunnudagin 26.01. kl. $22^{30}$




Leygardagin 25.01. kl. $21^{00}$
Leygardagin 25.01. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 26.01. kl. $22^{00}$




Leygardagin 25.01. kl. $17^{30}$
Sunnudagin 26.01. kl. $18^{30}$




Leygardagin 25.01. kl. $18^{15}$
Sunnudagin 26.01. kl. $17^{45}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 31.01.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**